## Føroyar lata flugu-net

Uttanríkisráðið hevur gjørt av at stuðla Reyða Krossi í Føroyum við 269.826 krónum til at keypa moskitonet til illa stødd fólk í Malavi. Moskitonetini fyribyrgja malariasjúkuni, sum er nógv útbreidd í Malavi. Peningurin røkkur til at keypa góð 4.000 net. Upplýst verður úr Malavi, at fleiri fólk ofta eru um eitt net. Hetta merkir, at nøkur túsund fólk kunnu fáa gagn av moskitonetunum, Føroyar lata, skrivar Uttanríkisráðið. Børn og kvinnur við barn eru í størsta vandabólkinum at fáa malaria. 28 prosent av teimum, sum doyggja á sjúkrahúsi, doyggja av malariasjúku. Tað eru ikki øll, sum hava ráð at fara á sjúkrahús, og tí koma nógvir sjúklingar ongantíð á sjúkrahús. Moskitonetini fara til eina verkætlan, sum í fjør og varir í fyrstu atløgu til 2010.



# Føroyskir brúkarar betur vardir

**Framyvir verður ikki loyvt at dylja lýsingartilfar í journalistiskum tilfari. Eisini verða herd krøv til prísáseting og vegleiðingar á vørum. Hetta eru millum broytingarnar í nýggju lógini um marknaðarføring, sum kemur í gildi 1. januar. Lógin snýr seg í høvuðsheitum um at tryggja okkum brúkarar, og hvussu fyritøkur eiga at sýna góðan atburð. Brúkarasamtakið hevur gjørt ein faldara um innihaldið í nýggju lógini, og fara vit her at vísa nakrar av broytingunum.**







### Lýsingar skulu vísast sum lýsingar

Onkuntíð kann okkurt líkjast eini grein ella annað jounalistiskt tilfar, sum í veruleikanum er ein lýsing. Tí skal tað framyvir standa púra greitt, at talan er um eina lýsing, um tað kann mistakast fyri at vera journalistiskt tilfar. Tað skal vera eyðsæð, hvat í blaðnum er tilfar hjá blaðstjórnini, og hvat er lýsingartilfar.

### Prísurin púra greiður

Brúkari skal frammanundan keypið vita púra greitt, hvør samlaði prísurin fyri vøruna er. Hetta merkir, at allar tænastur og ómaksgjøld skulu vera íroknað kostnaðin. Eitt dømi er, at oljuavgjaldið eigur at vera við í prísinum á einum ferðaseðli, fløskupant skal vera við í prísinum á eini sodavatn, og mvg'ið vera við á rokningini og ikki leggjast afturat aftaná.

### Villleiðandi lýsingar

Tað er ikki loyvt at brúka skeivar, villleiðandi, niðrandi ella órímiliga ófullfíggjaðar upplýsingar í marknaðarføringini. Eitt dømi um villleiðing er ein mynd við 6 pakkum av margarini og tekstinum "5 pk. fyri kr. 37,95". Tú kanst til eina og hvørja tíð krevja prógv fyri, at tað, sum lýsingin sigur, er satt. Um ein fyritøka lýsir við, at hon er betri enn ein onnur líknandi fyritøka, skal hetta kunna skjalprógvast.

### Forboð móti spam

Vinnufyritøkur hava ikki loyvi at senda út lýsingar ella á annan hátt at marknaðarføra við elektroniskum miðlum, so sum teldupostí, sms, mms, telefaxi ella telefon, uttan so, at tú frammanundan hevur biðið um hetta. Óumbiðið lýsingartilfar, sum verður borið út við postinum, kanst tú sleppa undan, við at seta seg í samband við Landsfólkayvirlitið. Hetta er bert galdandi fyri lýsingar til navngivnar persónar. Navnleysar útberingar, sum vit fáa í postkassan, eru ikki umfataðar av lógini.

### Fullfíggjað vegleiðing

Um onkur selur tær eina vøru ella tænastu, skulu allar umráðandi upplýsingar um vøruna vera við. Tú hevur rætt til eina nøktandi brúkaravegleiðing, og um sølufólkið veit okkurt, sum er umráðandi at vita um vøruna, eigur viðkomandi at siga tær tað.

### Keypsupplýsingar skulu vera greiðar

Tá talan er um sølufremjandi tiltøk, so sum tilboð ella útsølu, skulu tilboðstreytir um vørurnar vera eyðsýndar og lættar at finna. Tá søluprísir eru lækkaðir, skal prísmerkingin týðiliga vísa tann upprunaliga prísin á vøruni. Um tú fært tveir pakkar av kaffi fyri 40 kr., skalt tú kunna síggja, at vanligi prísurin á einum kaffipakka er 30 kr.

### Børn og ung

Børn eru góðtrúgvin og løtt at ávirka og skulu tí verjast. Øll marknaðarføringslógin verður sostatt tulkað strangari, tá talan er um marknaðarføring til børn. Harumframt skulu lýsingar til børn ikki eggja til harðskap, alkohol- og rúsevnismisnýtslu.

### Røtt merking

Lógin gevur møguleika fyri nærri ásetingum um merking. Tað vil siga, at landsstýrismaðurin við kunngerð kann gera ásetingar um innihald og merking av vørum.

### Brúkaraumboð

Vit fáa eitt brúkaraumboð, sum umsitur lógina og setir krøv til handilsfólk. Í ringasta føri kunnu brúkarar krevja endurgjald og revsing. Tú kanst venda tær til brúkaraumboðið við spurningum og ivamálum.

*Lagt til rættis: Rigmor Dam*




